# Fáa nýggja vatnsgoymslu í Hósvík

**Hósvíkar Kommuna fer í næstum at bjóða út arbeiðið upp á at gera nýggja vatngoymslu í bygdini. Eisini skal reinsiverk setast upp**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*



*Nýggj vatngoymsla og reinsiverk verða gjørd í Hósvík*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Hósvík:** Hósvíkingar skulu hava meira og betri vatn, hevur kommunan gjørt av. Nýggj goymsla verður gjørd, og reinsiverk skal eisini setast upp.

Jógvan Mørkøre, borgarstjóri í Hósvík, sigur, at ein av næstu døgunum verður biðið um tilboð at gera fýra nýggjar vatnbrunnar oaman fyri verandi goymsluna við Toftafoss sunnanvert í Hósvík. Samstundis skulu inntøk gerast ovarlaga í Toftá, og leiðingar leggjast í brunnarnar.

Við í verkætlanini er eisini reinsiverk, sum tó ikki verður gjørt í ár, væntar hann. Tað verður so kostnaðarmikið, at mett verður ikki, at fíggjarlig orka er til at gera alt í einum ári. Tí verður kalkulerað við eini tvey ára ætlan, til at gera vatnprojektið liðugt, sigur borgarstjórin.

Hósvík er væl fyri, tá tosað verður um kloakkviðurskifti. Arbeitt hevur verið við at gera kloakkirnar í Hósvík lidnar, og nú vantar bara at binda nøkur heilt fá hús í, so er liðugt, sigur Jógvan Mørkøre. Tað arbeiðið verður gjørt í hesum árinum.

Hósvíkar Kommuna fer eisini at gera eitt øki á havnarlagnum klárt til at byggja høll á, sum umrødd er aðrastaðni í blaðnum. Har skal fyllast eitt sindur út á sjógv, og fundamentið til høllina gerast klárt.

Kirkjugarðurin hevur fingið eitt eyka lið, har nú ber til at koyra ein rullustól ella barnavogn, um tað skal vera, ígjøgnum.

Og so eru tað gøtunavnaskeltini. Postverkið vil hava gøtunøvn við húsanummari allastaðni í landinum. Og her er Hósvik undangongubygd. Allir vegir og gøtur í Hósvík hava fingið navn, og skeltini eru sett upp, sigur Jógvan Mørkøre, borgarstjóri í Hósvík.

# Thor byggir í Hósvík

**Reiðaríið Thor í Hósvík fer í næstum at byggja eina høll á havnarlagnum í Hósvík. Høllin, sum verður umleið 500 fermetrar til víddar, skal hýsa fyristiting og goymslu**

REIÐARAVIRKI
*Edvard Joensen*

**Hósvík:** Reiðaríið Thor í Hósvík skal hava betri hølisviðurskifti. Bygd verður ein høll á havnarlagnum í Hósvík, sum skal hýsa bæði fyrisiting og goymsluhølum undir sama taki.

Gunnbjørn Joensen, stjóri í P/F Thor, sigur, at sum er, hava tey ov trongligar umstøður at arbeiða undir. Skrivstovan er í einum sethúsum, har tey hava umleið 50-60 fermetrar at ráða yvir, Og tað er alt ov trongligt, sigur hann.

Goymsluviðurskiftini eru heldur ikki nóg góð. Ymisk útgerð, sum brúkast skal, verður goymd í bingjum á havnarløgum, har skipini koma.

Men hetta fer alt at broytast, tá nýggja høllin verður bygd.

Gunnbjørn Joensen sigur, at ætlanin er at fylla eitt lítið øki út aftur at tí, sum er á havnaralagnum í Hósvík. Har verður so høllin, sum fer at verða umleið 500 fermetrar til víddar, bygd.

Gunnbjørn Joensen hevur ikki hug at siga nakað um prís á høllini.

Thor er reiðarí í menning, sum serliga hevur lagt seg eftir at vera við í oljuvinnuni við veitingar- og hjálparskipum. Tó byrjaði tað í fiskivinnuni, har eitt skip í løtuni er eftir.

Tað er garnabáturin Thor. Umframt er so Leitissteinur, sum er fiskiskip, men sum í løtuni er vaktarskip í oljuvinnuni.

Vaktar- og veitingarskipini eru fimm í tali, og eru tey spjadd víða.

Faroe Connector er í Norðsjónum, har hann arbeiðir fyri eitt skotskt felag. Tórsvík er eisini í Norðsjónum fyri hollendingar. Thor Chaser er í Persiska Flógvanum. Thor Supporter er í India, meðan North Star í løtuni liggur á Hósvík.

Gunnbjørn Joensen sigur, at North Star væntandi fer í Norðsjógvin ein av fyrstu døgunum, hagar hann er leigaður einum norskum felag.



*Thor fer at byggja fyrisitingar- og goymslubygning sunnan fyri asfalttangarnar á havnarlagnum í Hósvík. Skipið við bryggjuna er North Star, sum Thor eigur*
*Mynd: Edvard Joensen*

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 8. februar til hósdagin 14. februar**

## Melodi Grand Prix 2002




## Ein løtt vika

*Heri á Rógvi ummælir:*



At líta aftur um bak vísir seg ofta at vera ein ógvuliga selektiv delikatessa. Tað, ið ein ikki tímir at minnast aftur, kann lættliga vera farið fram við í minninum. Men tað eru altíð løtur, ið verða hangandi í minninum, hóast tað ikki júst er ynskiligt. Soleiðis er tað væl saktans eisini, tá litið verður aftur á eina sjónvarps- og útvarpsviku.

Hesir góðu loftmiðlar leggja hvør í sínum lagi eina so fjølbroytta skrá til rættis sum teir megna og vilja.

Tað er sjálvandi ymiskt, hvørjar fortreytirnar eru hjá teimum ymsu rásunum. Formurin hevur sjálvsagdan týdning, og ymiskt er eisini, hvussu fíggjarligu útlitini eru hjá teimum ymsu rásunum – bæði í mynd og talu.

Henda ársins tíð er ógvuliga hóskandi til kanska serliga sjónvarp, tí nógv er myrkt, og veðrið hevur verið rættiliga ótespiligt í seinastuni. Júst hetta sama veðrið og kanska serliga kavin hava eisini verið á skíggjanum hjá SvF, og tann ógvuliga veðuráhugaði føroyingurin kann fáa sín tørv nøktaðan.

Borgarar í Havn hava eisini merkt, at veturin leikar upp á tað harðasta, og løturnar frammanfyri skíggjanum eru eisini rættiliga nógvar. So mikið, at menn eru farnir av húsum og beina leið oman í radiobúðina eftir einari parabol fyri lágprís. Ikki júst ein álitisváttan til føroysku miðlarnar. Tað er tó ein sannroynd, at hyggjarin gerst støðugt gerst meira kræsin, og enski fótbólturin og alskyns filmar vil eisini tann føroyski hyggjarin hava hendur á. Tað skerst tó ikki burtur, at fólk í Føroyum dáma at síggja og hoyra føroyskt. Nú er eisini líkt til, at eitt kommunalt ella enntá landsdekkandi antennufeløg verður veruleiki við fjarskiftisfyritøku sum veitara. Hetta setir aftur nakrar tankar í gongd um teir almennu føroysku miðlarnar, eins og teir privatu. Hetta ávirkar væl ikki bert loftmiðlar, men kappingin harðnar á øllum økjum. Í ætlanunum við framtíðar Rás Føroyar, verður møguleikin við alnetssambandi eisini tikin upp á tungu, og hetta vil so eisini gera alnetið til ein loftmiðil, sum higartil bert fyritøkur hava kent til. Møguleikin fyri einari nýggjari »føroyskari« rás kennist minni fjarur.

**Hondbóltur**

Leygardagin í farnu viku borðreiddi SvF og ÚF við fleiri tímum av hondbólti. Hetta er veruliga eitt høvi, har Sjónvarpið fær møguleikan at spíla seg út. Við livandi myndum av einum ógvuliga væl umtóktum vetrarítrótti, er einki at taka seg aftur í, at Sjónvarpið riggar mest sum perfekt. Hóast Útvarpið eigur speakarar við góðum røddum og gjølligum orðavali, so eigur Sjónvarpið míni evni til at geva nøkrum gætur. Tað er eisini ógvuliga sjáldsamt at fáa møguleikan at fylgja føroyskum ítrótti tætt úr stólinum í stovuni. Tann annars so lítið áhugaverda og tunna skráin, sum er leygardagar í Sjónvarpinum - ein dag har tú hevur tíð og rásarúm at hyggja at sjónvarpi – verður brádliga til okkurt spennandi. Tað kunnu so vera tey, ið ikki hava tann minsta áhuga fyri føroyskum ella útlendskum hondbólti, men tey lata vit liggja á hesum sinni.

Tað var tó ikki minni ein føroysk framleiðsla, enn at spælararnir venda skeivan veg, tá liðini skuldu presenterast.

Meðan Útvarpið eigur røddir, sum eru vandar við at varpa út tílíkt, so er støðan ikki tann sama í Sjónvarpinum. Útvarpið hevur onkuntíð roynt seg við at hava ein sokallaðan serfrøðing at hjálpa til við at varpa út, og hetta hevur ikki beinleiðis verið ein fragd at lurta eftir. Sjónvarpið royndi seg eisini við tílíkum til báðar hondbóltsfinalurnar leygardagin. Endamálið við hesum er at geva hyggjarunum eitt betri forstáilsi av dystinum, umframt at skapa eina meira dynamiska frásøgn.

Tað gerst óalmindiliga stirvið at lurta eftir teimum somu setningunum umaftur og umaftur. Teir allarflestu hyggjararnir hava mestur fingið inn við skeið, at tað hevur ómetiligan sálarligan týdning at skora fyrstu, aðru ferð, triðju ferð...

**Ynskiløta**

Tað rann mær til hugs fyrr í vikuni, at hvørja ferð eg seti meg í ein bil, hoyri eg eitthvørt ynski at hoyra ein sang. Frágreiðingin er, at Rás 2 sendir tað mesta av seinnapartinum eina ynskiløtu, har møguleiki er at ynskja sær eitt lag, og ein heilsan fer eisini í luftina. ÚF hevur eisini onkra tílíka sending á skránni, og hetta telist óivað eisini millum tey stóru hittini hjá Útvarpinum.

Sendingin hjá Rás 2 er skipað soleiðis, at skrivligar heilsanir verða lisnar og eitthvørt lag verður spælt.

Hóast tú kanska ikki arbeiðir í frystirúminum ella er skerðari nummar sjey, so er sendingin deiliga løtt at lurta eftir. Tónleikurin er fyri tað nógva sokallaður mainstream tónleikur, ið liggur í tí lættari endanum. Tað er eingin ivi, at sendingin hóskar væl til tey, ið hava útvarpstólið koyrandi tað mesta av arbeiðsdegnum. Ein interaktivur brúkaraflati er altíð góður, og tað er valla heldur nakar ivi um, at sendingin rakar breitt millum annað. Tey alternativu leggja mestur lítið, men herfrá skal bert ljóða góð orð. Hetta er ein sending, sum eisini minnir okkum á støðuna hjá Rás 2 sum útvarpsstøð, ið kanska ikki er komin til verðina fyri at royna at líkjast tí stóra útvarpsrásini.

## Mowgli




## Røddir úr norði




## Halløj i flåden




## Lev og lad dø

